# SAMTÍÐARLIST Í AL

VIT EIGA TÍ Í **STØRRI** MUN AT EGGJA TIL, AT **MØRK** VERA FLUTT, AT **SKAPT** VERÐUR ÚR **NÝGGJUM**, OG IKKI BERT **HEIÐRA** TÍ GAMLA SKÚLANUM. VIT EIGA AT **STUÐLA** TEIMUM, SUM SKAPA ÚR **SAMTÍÐINI**, EISINI HVAT VIÐVÍKUR **TØKNI** OG RÚMD. VIT EIGA AT STUÐLA TEIMUM **MENTALT** OG VIÐ AT GEVA TEIMUM EIN **PALL**. FYRR MENNAST VIT IKKI VIÐ LISTINI, SKRIVAR **SISSAL KRISTIANSEN** Í HESI GREIN UM LIST Í ALMENNA RÚMINUM



***Seyðirnir uttanfyri Norðurlandahúsið í Havn eru millum mínar yndisstandmyndir í Føroyum - stuttligir, hugvekjandi, og sjarmerandi***
Mynd: Jens Kr. Vang



**LIST**

**Sissal Kristiansen**
post@sosialurin.fo

Tá eg fyri øðrum skal lýsa føroyingin og føroyska mentan, fangi eg meg mangan í at lýsa okkum sum eitt kreativt fólk, eitt skapandi fólk við longum traditiónum sum listafólk. Eg havi hetta ikki frá ongum. Eg eri fangað í spiralinum sum bert sær tað góða og seti ikki spurnartekin við, hvat kundi verið. At eg eisini lesi hetta í almennum sjálvslýsingum av Føroyum og føroyingum í ferðavinnumiðlum og øðrum miðlum sum venda sær úteftir, styrkir eisini mína mynd av okkum sum tjóð og fólk.

Men í veruleikanum eri eg ikki heilt so samd við mær sjálvari og almennu lýsingini av okkum. Í veruleikanum haldi eg, at vit eru alt ov stirvin og vanahugsandi. Eg haldi faktiskt ikki, at tað er so kreativt at mála somu motiv 1000 ferðir ,og altíð at brúka sama miðilin - uttan at fara út um rammurnar.

## Flyta mørkini

Tá samfelagið er so lítið sum okkara, er enn meira neyðugt at vit eru opin fyri nýhugsan. Tí dømandi røddin hoyrist betur í lítla samfelagnum enn í stóra, og er tað tí skjótari at køva spírandi nýhugsanina, og harvið skapa ein bólk av homogenum listafólkum enn aðrastaðnis, har pallurin er størri. Vit eiga tí í størri mun at eggja til, at mørk vera flutt, at skapt verður úr nýggjum, og ikki bert heiðra tí gamla skúlanum. Vit eiga at stuðla teimum, sum skapa úr samtíðini, eisini hvat viðvíkur tøkni og rúmd. Vit eiga at stuðla teimum mentalt og við at geva teimum ein pall. Fyrr mennast vit ikki við listini.

Hyggja vit nærri at almenna rúminum, so hevur standmyndin tað partvís gott. Hóast eisini hon er um at gerast troyttandi eins. Eg sakni at almenna rúmið gerst meira sprelskt. Ein uppgáva sum bæði land og kommunur eiga at vera meira tilvitað um. Men eisini størri fyritøkur eiga at síggja virði í at stuðla nýhugsan innan list.

## Standmyndir í pløgg

Vit kunnu tó skjótt og lætt seta hol á. Eg kann ikki koma uttanum eitt av hugskotunum hjá Katrinu í Geil tá hon í útvarpinum varð spurd um, hvussu hon metti at vit áttu at marknaðarført okkum í útheiminum.

Ímillum hugskotini var eitt hugskot til eitt PR átak, har ein hópur av bindikonum varð settur at binda uppá ein bygning í NY. Pragtfult! Tað hevði skapt ans, áhuga og víst á listaligar dygdir okkara.

Men vit kunna byrjað heima. Vit kundu klætt mongu standmyndirnar bundin ella vovin pløgg. Rasmus Effersøe hevur longu lagt kropp til mangt á Tinghúsvøllinum, so hann er vanur við tað. Hetta hevði skapt ans, provokerað, umframt at tað vildi endurspegla ta samtíð vit liva í, har gamalt fær nýtt lív.

## Fossur og tunnil

Eitt annað dømi er ljósspælið við fossin í Hósvík. Talan er ikki siðbundna list. Men her hevur onkur sæð ein møguleika at lívga um myrku tíðina, fanga eitt náttúrgivið spæl og seta ljós á tað.